## Samgongan stóð saman

**Mánakvøldið endaði 2.viðgerð av fíggjarviðgerðini. Teir 17 samgongutinglimirnir samtyktu allar broytingar hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, meðan andstøðan atkvøddi ímóti**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Mánakvøldið endaði 2. viðgerð av uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2003. Í sínum áliti til fíggjarlógaruppskotið hevði meirilutin í fíggjarnevndini gjørt hópin av broytingum, umframt at inntøku- og útreiðslumetingar hjá umsitingini undir ymsu landsstýrismonnum vóru endurskoðaðar.

Og teir 17 tinglimirnir hjá samgonguni valdu at atkvøða fyri øllum broytingaruppskotunum hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, samtíðis sum andstøðulimir atkvøddu ímóti. Uppskotið vísir eitt yvirskot uppá 240 milliónir krónur, áðrenn avdráttir av skuld eru goldnir, og góðar 90 milliónir krónur eftir avdráttir.

Men áðrenn hetta yvirskot kann røkkast, skulu fleiri lógarbroytingar gerast. Millum annað hevur Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum, víst á, at innan almannamál fara 14,3 milliónir at mangla í til lógarbundnar útreiðslur til fólka- og fyritíðarpensjónir og forsorg. 11 milliónir skulu sparast í dagpeningaskipanni, og har skal lógin broytast. 3,9 milliónir skulu sparast á lógarbundnu játtanini til studning til lærupláss og 10 milliónir skulu sparast á lógarbundnu játtanini til Barsilsskipanina. Lógin um Barsilsskipanina er komin í løgtingið, meðan hinar nevndu umframt aðrar lógarbroytingar enn ikki eru lagdar fyri løgtingið.

Andstøðan hevði síni broytingaruppskot til fíggjarlógaruppskotið, men tey vóru øll feld, tá atkvøðast skuldi við 2.viðgerð.

# Fakfeløg hjá tímaløntum mótmæla politikkinum hjá samgonguni

**Sjey fakfeløg hjá tímaløntum mótmæla hvassliga ætlaðu broytingunum í dagpeningaskipanini. Samgongan ætlar at spara 11 milliónir krónur við at áleggja arbeiðsgevaranum at gjalda fyrsta sjúkradagin hjá tímaløntum. – Við hesum leggur samgongan upp til, at tey, sum eru ringast fyri frammanundan, nú eisini skulu rakast tá tey gerast sjúk, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í FA. Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum vísir á, at fyri arbeiðsgevaran er tað í síðsta enda ein spurningur um krónur og oyru, og tí er vandi fyri, at tey veikastu glíða út av arbeiðsplássunum**



*- Samgongan hevur gjørt av at broyta dagpeningaskipanina, so tímalønt ikki fáa dagpening frá fyrsta sjúkradegi. Samgongan metir seg kunna spara 11 milliónir krónur, sum ætlanin er at arbeiðsgevarar skulu gjalda ístaðin. Ætlanin fær kaldliga móttøku, bæði frá fakfeløgum og arbeiðsgevarum*

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Uppskotið til løgtingsfíggjarlóg, sum meirilutin í fíggjarnevndini hevur latið úr hondum, vísir enn einaferð, at verandi samgonga ætlar at vanligi føroyski løntakarin skal gjalda fyri vitleysa sparingarpolitikk landsstýrisins.

Soleiðis byrjar eitt bræv, sum sjey fakfeløg hjá tímaløntum handaðu øllum flokkum á løgtingi undir 2.viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum mánadagin. Brævið er undirskrivað av Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, Landsfelag Handverkaranna og Føroya Handverkarafelag.

Fakfeløgini finnast hvassliga at ætlanunum hjá samgonguni um at broyta dagpeningaskipanina, so dagpeningur ikki verður goldin frá fyrsta sjúkradegi. Á henda hátt væntar samgongan at spara 11 milliónir krónur. Sparingin, sum krevur broytingar í lógini um dagpeningaskipanina, er longu tikin við í fíggjarlógaruppskotið. Í staðin ætlar samgongan at áleggja arbeiðsgevarum at gjalda fyri fyrsta sjúkradagin hjá tímaløntum

### Ikki allar súðir syftar

Mánakvøldið samtyktu samgongulimirnir broytingarnar hjá meirilutanum í fíggjarnevndini til fíggjarlógaruppskotið, og harvið eisini broytingina í dagpeningaskipanini. Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, var ein teirra, ið mánadagin fylgdi orðaskiftinum við 2. viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum, og fílist hon á, at áheitanin frá fakfeløgunum var nærum ikki tikin uppá tungu undir viðgerðini.

- Men eg trúgvi kortini ikki, at allar súðir eru syftar enn. Ætlanin krevur broytingar í lógini um dagpening, og eisini vil eg síggja tann dag, tá arbeiðsgevarar fara at gjalda karensdagarnar hjá teimum tímaløntu, sigur Ingeborg Vinther.

Hon ásannar at ikki er óhugsandi, at arbeiðsgevarar, verður teimum álagt við lóg at gjalda karensdagarnar, fara at brúka hetta í komandi lønarsamráðingum. Men hetta kemur als ikki uppá tal, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

- Eg veit ikki, um hetta er taktikkur hjá samgonguni, men fakfeløgini fara ongantíð at góðtaka at karensdagarnir vera drignir inn í lønarsamráðingar, sigur Ingeborg Vinther.

Í brævinum til politisku flokkarnar heita feløgini á allar løgtingslimir um at atkvøða ímóti teimum asosialu sparingum, sum lagt verður upp til. Feløgini siga seg ikki fara at lata hetta um seg ganga, og eru til reiðar at taka neyðugu stig fyri at steðga áganginum móti løntakarum. Ingeborg Vinther sigur, at hon kann bara staðfesta, at hóast áheitanina frá feløgunum valdi samgongan kortini at samtykkja sparingina í dagpeningaskipini.

- Nú mugu vit bíða eftir, hvat fer at henda. Verður endaliga úrslitið, at arbeiðsgevarin skal gjalda fyri fyrsta sjúkradagin, so rakar tað ikki í fyrstu atløgu arbeiðstakaran. Men tað er greitt, at hetta fer at gera støðuna munandi verri hjá teimum veikastu á arbeiðsmarknaðinum mótvegis arbeiðsgevaranum, tí tey sum eru nógv sjúk fara at vera koyrd til hús, vísir Ingeborg Vinther á. Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag leggur afturat, at ætlanin hjá samgonguni bara rakar tey tímaløntu, tí tey sum eru fevnd at starvsmannalógini og onnur fastlønt fáa løn í samband við sjúku, og verða tí ikki rakt av sparingunum hjá samgonguni.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, ásannar, at broytingin í dagpeningalógini kann fara at raka tey veikastu á arbeiðsmarknaðinum. Hann vísir á, at Føroyar eru eitt lítið samfelag, har tað hevur verið vanligt at arbeiðspláss hava víst eitt ávíst forstáilsi fyri, tá fólk hava verið sjúk. Men hetta kann skjótt broytast, um arbeiðsgevarin skal rinda fyri sjúkradagarnar hjá tímaløntum.

- Í síðsta enda er tað eisini ein spurningur um krónur og oyru, og tí er tað ein ávísur vandi fyri, at tey veikastu á arbeiðsplássunum, tey ið eru ofta sjúk, fyrst verða uppsøgd, tá minni arbeiði er á virkjunum, sigur Jan Mortensen.



*- Fyri arbeiðsgevarar er tað í síðsta enda talan um krónur og oyru, og skal vinnan gjalda fyrsta sjúkradagin, kann tað koma at ganga út yvir tey veikastu, ásannar Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum*



*- Broytingin ger støðuna munandi verri hjá teimum veikastu á arbeiðsmarknaðinum, sigur Inteborg Vinther. Sjey fakfeløg hjá tímaløntum mótmæla hvassliga politikkinum hjá samgonguni*

### Standa saman

Lógin um dagpening er frá maj mánað í fjør. Áðrenn lógin kom í gildi skrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag sínar felags viðmerkingar til Almanna- og Heilsumálastýrið. Í brævinum mæltu feløgini til, at tað almenna eigur at rinda fyri dagpening frá fyrsta sjúkradegi. Tá vístu feløgini á, at í grannalondunum verða arbeiðsgevarar álagdir at gjalda ávís gjøld, tey veiku detta út av arbeiðsmarknaðinum, og síðan skal tað almenna royna at seta skipanir í verk, ið fáa tey innaftur á arbeiðsmarknaðin. Tí verður tað ikki bíligari fyri tað almenna, at arbeiðsgevarar skulu rinda fyri fyrsta sjúkradag, vístu feløgini á.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, sigur, at støðan hjá arbeiðsgevarum er tann sama í dag sum tá viðmerkingarnar vóru gjørdar til lógina um dagpening, og tí mælir hann, eins og fakfeløgini hjá tímaløntum, frá at broyta lógina.



# Tingmenn krevja hoyring um Gjaldskipan

**Tingmenn ivast í, hvør tingsins vilji er í málinum um Gjaldskipanina og vernd av persónsupplýsingum. Tí krevja teir eina hoyring, har málið verður lýst út í hvønn krók. Tingmenninir siga seg vita ov lítið til at verða avgjørdir í sínari søk í hesum máli**

PERSÓNSVERND
*Ingi Rasmussen*



*Kristian Magnussen skjýtur upp, at ein hoyring verður fyriskipað í málinum millum Elektron og Høgna Hoydal um persónsupplýsingar.*

Tingmenn innan og uttan fyri samgonguna krevja nú eina hoyring í málinum um Elektron og nýggju Gjaldskipanina.

Málið er íkomið, tí Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, vil herða kunngerðina um vernd av persónsupplýsingum, so nýggja Gjaldskipanin hjá peningastovnunum og Elektron í samstarvi við PBS, verður steðgað.

Gjaldskipanin hevur sum fortreyt, at nakrar upplýsingar verða sendar av landinum, og tað heldur landsstýrismaðurin ikki samsvara við lógina um vernd av persónsupplýsingum.

Dátueftirlitið hevur givið loyvi til skipanina, men tað vil landsstýrismaðurin gera um.

### Øll sjónarmið fram

Høgni Hoydal førir fram, at hann bert umboðar tingsins vilja í málinum. Men nógvir tingmenn ivast nú stórliga í hesum

Tað fær Kristian Magnussen løgtingsmann fyri Javnaðarflokkin at skjóta upp, at ein hoyring verður fyriskipað, har øll sjónarmið koma á borðið.

– Ongin er áhugaður í at flyta meira av landinum, enn gott er. Men vit hava eina lóg, har tað er loyvt, og Dátueftirlitið, sum er hægsti umstingarligi myndugleikin á økinum, hevur loyvt peningastovnunum at fara undir hesa Gjaldskipan, og tað kann landsstýrismaðurin ikki bara steðga uttan víðari, sigur Kristian Magnussen.

Hann heldur, at málið um Gjaldskipan kann verða brúkt sum undandømi, og tí er neyðugt at alt er púra greitt fyri framtíðina.

– Hví ikki geva Elektron, Dátueftirlitinum, umsitingini í landsstýrinum og løgtingsskrivstovuni høvi at siga sína hugsan í málinum? So vistu vit øll betur, og løgtingið hevði verið betur ført fyri at gjøgnumskoðað, um landsstýrismaðurin røkir teirra vilja, sigur Kristian Magnussen.

### Vita ov lítið

Javnaðartingmaðurin stendur ikki einsamallur við sínari áskoðan. Aðrir tingmenn vísa somuleiðis á, at teir vita ov lítið til at taka støðu til, um Høgni Hoydal við at broyta kunngerðina um persónsupplýsingar ger eftir tingsins vilja.

– Eg haldi, at hetta málið er øgiliga torskilt, og tað er ilt at gjøgnumskoða. Tað gerst bara fløktari, so hvørt meira og meira kemur fram. Eg eri ikki so avgjørdur, og veit ikki, hvør er á rættari leið. Tí hevði ein møguleiki fyri at fingið meira innlit og eina lýsing av málinum verið kærkomin hjá okkum politikarum, sum kunnu ivast í, hvat er galdandi, sigur Jógvan á Lakjuni.

Herfyri var orðaskiftið um málið í tinginum, og tá søgdu sambandsmenn seg somuleiðis verða sinnaðir fyri at fáa nærri kunning um málið og hildu tað hevði verið upp á sítt pláss við einari hoyring.

# Nógv fáa viðgerð fyri barnloysi

**Umleið 25 føroysk pør fáa hvørt ár viðgerð ímóti barnloysi. Landsstýrismaðurin hevur ongar ætlanir um at steðga við at bjóða hesa viðgerð ókeypis, men hann umhugsar at gera reglur fyri, hvør kann fáa viðgerð**

BARNLOYSI
*Ingi Rasmussen*

Í fjør sendi føroyska sjúkrahúsverkið 25 pør til Danmarkar at fáa viðgerð ímóti barnloysi. Í 2000 var talið 28 pør.

Tað upplýsir Bill Justinussen, landsstýrismaður við heilsumálum.

Sjúkrahúsverkið hevur í løtuni játtað 500.000 krónur til sjálva viðgerðina og umleið 400.000 krónur til ferðing og uppihald. Afturat hesum koma aðrar almennar veitingar, millum annað dagpeningur, og harumframt rindar sjúkrakassin 75 prosent av útreiðslunum til heilivág.

Spurningurin um játtanina til barnloysi kom upp, tá landssstýrismaðurin fyribils steðgaði viðgerðunum restina av árinum, men hetta var tikið aftur, tá fíggjarnevndin hjá løgtinginum játtaði meira pening til økið.

Landsstýrismaðurin hevur ongar ætlanir um at steðga hesari viðgerð, leggur hann dent á.

– Tá talan er um almenna leiklutin í viðgerð fyri barnloysi, er ætlanin framhaldandi at bjóða ókeypis viðgerð móti barnloysi. Tó verður umhugsað at seta politisk stevnumið fyri viðgerðini, sigur Bill Justinussen og vísir eitt nú til at seta aldursmark á.

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

Nissan Almera 2,0 Diesel GX
grønur, 5 hurðar,
árg. 1996.
89.000

Nissan Primera 1,6 A/C
reyður, 4 hurðar,
árg. 1998, 70.000 km.
125.000

Peugeot 106 Diesel
gráur, 3 hurðar,
árg. 1999, 80.000 km.
85.000

Peugeot 306 Diesel 1,9 AC
bláur, 4 hurðar,
árg. 1999, 61.000 km.
125.000

Peugeot 406 ST 2,0 Hdi
vínreyður, 4 hurðar,
árg. 1999, 120.000 km.
164.000

Opel Astra 1,7 DT
brúnur, 4 hurðar,
árg. 1996.
75.000

Opel Astra 2,0 DTI
svartur, 5 hurðar,
árg. 1999, 36.000 km.
138.000

Opel Astra 1,7 DT Van
bláur, 5 hurðar,
árg. 1998, 82.000 km.
78.000

Opel Astra 1,7 DTI
gráur, 5 hurðar,
árg. 2002, 8.000 km.
179.000

Opel Astra 2,0 DT
grønur, 5 hurðar,
árg. 2001, 38.000 km.
175.000

Opel Vectra 1,8
svartur, 4 hurðar,
árg. 1996, 80.000 km.
122.000

Opel Vectra 1,7 Diesel
reyður, 4 hurðar,
árg. 1995, 118.000 km.
76.000

Saab 9-3 TDI
bláur, 5 hurðar,
árg. 2000, 67.000 km.
209.000

Audi A4 Tdi
bronze, 4 hurðar,
árg. 1995, 135.000 km.
130.000

Mazda 626 2,0
svartur, 4 hurðar,
árg. 1996, 65.000 km.
78.000

Honda HR/V 4x4 Van
gulur, 3 hurðar,
árg. 1999, 40.000 km.
100.000

Ford Escort 1,6 Van
reyður, 5 hurðar,
árg. 1996
65.000

Ford Escort 1,8 Diesel
grønur, 4 hurðar,
árg. 1995, 152.000 km.
65.000

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

% Meinhardt Arge
v/ Dygdarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

www.sosialurin.fo